


## Vælumtóknur gentubólkur á mentanarviku

Nýggi og vælumtókti gentubólkurin Faroe 5 verður eisini á pallinum á Mentanarvikuni í Runavík. Tað eru Jónvá Ellingsgaard, Lillian Dalsgaard, Asta Højgaard, Ragnhild Dam og Vígdis Fjallstein, ið manna fyrsta føroyska gentubólkin nakrantíð. Við hittunum "Bara 1 spæl" og "Tú fert altíð at vera har" hava tær longu sungið seg inn í hjørtuni á nógvum føroyingum, og fyrst í november mánaði er ætlanin, at Faroe 5 geva sína fyrstu fløgu út. Harafturat verða dansigenturnar Katrin & Diana á skránni. Katrin og Diana er tvær ungar toftagentur, ið hava gingið á dansiskúlanum Stepz í Keypmannahavn, har tær hava lært tað nýggjasta nýggja innan dansiheimin, so tað verður spennandi at síggja. Eins og undanfarin ár verður Bassi sjálvandi aftur á staðnum, og hann plagar altíð at hava okkurt gott við til børnini. Eir í Ólavsstovu og Lív Reinert Kjeld verða vertir á tiltakinum, sum verður í ítróttarhøllini í Runavík sunnudagin 26. oktober.

# kipaeftirlitið

av svari sínum sigur, at um felagið hevur aðrar spurningar, er FNS vælkomið at seta seg í samband við undirritaða, sum er stjórin, Vilhjálmur Gregoriussen, sjálvur, ella við onnur starvsfólk á stovninum.

### Helst fakliga rætt

- Tað kann væl vera, at svarið hjá Skipaeftirlitinum er fakliga rætt, men mær dámar ikki hugburðin um, at tað at síggja til er líka mikið, um sjófólk umborð á skipum undir føroyskum flaggi verða útnyttað á so grovan hátt, sum málið um Topaz er eitt dømi um. Tað tykir mær løgið, at ein slíkur stovnur sum Skipaeftirlitið eftir svarinum at døma ikki heldur hetta vera ein trupulleika.

Eyðstein vísir á, at tá ein reiðari ynskir at skráseta skip undir føroyskum flaggi, kann Skipaeftirlitið ikki nokta, at skipið verður skrásett. Tað er ikki fyrr enn tann dag, tá skipið skal hava neyðugu siglingarloyvini, at eftirlitið kemur uppí málið.

- Men løgtingslógin um trygd á sjónum er kortini galdandi, sjálvt um skipið liggur við bryggju, og tað er sjómanslógin helst eisini, leggur hann aftrat.

### Á altjóða palli

Eyðstein vísir á, at ikki minst í hesum døgum, nú føroyska samfelagið tosar um, at føroyska altjóða skipaskrásetingin skal gerast heimsumfevnandi, eiga vit sum tjóð at ansa væl eftir, hvat tað er, sum vit fyritaka okkum uttanfyri landoddarnar.

- Gera vit ikki tað, kann hetta rættiliga koma okkum aftur um brekkur í ringum umdømi kring um heimin, leggur hann aftrat.

Formaðurin í Føroya Skipara- og Navigatørfelag sigur, at manningarfeløgini helst fara at taka ein fund við nýggja landsstýrismannin um viðurskiftin, sum eitt nú snúgva seg um betri eftirlit við virksemi á føroyskum kjøli.

- Vit vilja eisini hava at vita, hvat føroyskir myndugleikar halda um ymiskt, sum frammi hevur verið um, hvussu útlendsk sjófólk eru viðfarin umborð á skipum undir føroyskum flaggi.

Eyðstein sigur, at manningarfeløgini kunnu ikki standa sum garrantar fyri, at viðurskifti umborð á føroyskum skipum eru í lagi kring um heimin.

- Vit ivast eisini í, hvussu rætt tað er, at skip kunnu skrásetast undir føroyskum flaggi – uttan, at Skipaeftirlitið yvirhøvur hevur verið umborð á hesum skipum. Tað tykist undarligt.

### Seta spurnartekin

Hann leggur dent á, at líkamikið hvar í heiminum skip sigla undir føroyskum flaggi, er somu lógir galdandi, sum um skipini sigldu í okkara egna sjógvi.

- Vit eru í iva um mátan, sum Skipaeftirlitið rekur sítt virksemi, har tað í nógvum førum eru klassafeløg, sum gera eftirlitsarbeiði, sigur Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag.



*Eyðstein Djurhuus, formaður í Føroya Skipara- og Navigatørfelag*



*Fiskakassar, sum Pack and Sea framleiðir, skulu kunna upplýsa um sporføri hjá fiskinum, og væntandi kann skipanin takast í nýtslu fyrst í komandi ári*

*Mynd: Fiskeritidende*

# Nýggir fiskakassar kunna um sporføri

**Um fáar mánaðir fara merkir á fiskakassum at kunna siga frá um sporføri hjá fiskinum, sum er í kassunum. Her verður møguligt at fylgja fiskinum – frá tí, at hann verður veiddur og heilt út í virkisliðið**

SPORFØRI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Arbeiði hjá dønum at gera felags fiskakassar hevur verið rakt av seinkingum og forðingum. Men hetta hevur samstundis gjørt, at elektronikkurin í merkjunum á kassunum, sum skal upplýsa um sporføri, er vorðin meira umfatandi og betur.

Nú ber eitt nú til at leggja upplýsingarnar um sporføri inn við einum hondskannara, og hesir upplýsingar verða síðan nullstillaðir aftur, tá fiskakassin fer í eina vaskimaskinu. Tað er kassafyritøkan Pack and Sea, sum stendur fyri framleiðsluni, og stjóri í felagnum er Kurt Madsen.

### Skannaraútgerð

Felagið hevur júst gjørt avtalu við tvey feløg innan danska fiskiídnaðin, Dansk Fisk og Danmarks Fiskeindustri- og Eksportforening, um nýtslu av sonevndu RFID-merkjunum, sum skipan fyri sporføri.

Tað eru eitt nú hesi merki, sum hava elvt til trupulleikar í framleiðsluni av grønu standar-fiskakassunum. Nógvar royndir eru gjørdar at stoypa merkini inn í kassarnar, men nú hevur stjórnin í Pack and Sea gjørt av at keypa útgerð, sum kann seta merkini inn í plast, sum síðan kann sveisast uttan á kassarnar.

- Hetta eru maskinur, sum vit vænta at fáa um 3-4 mánaðir, men longu nú taka vit stigið til at fáa allar havnir at fáa sær skannaraútgerð, soleiðis at tær eru klárar, tá kassarnir verða tiknir í nýtslu, sigur stjórin, Kurt Madsen.

### Klárir í 2009

Kurt vísir á, at fiskiídnaðurin hevur gjørt avtalu um, at virkini sjálvi skulu útvega sær skannaraútgerðina.

- Vit vóna, at kassarnir við merkjum, sum kunnu siga frá um sporføri hjá fiskinum, verða klárir at taka í nýtslu í donsku havnunum í byrjanini av 2009, sigur stjórin.

Kurt Madsen heldur, at samlaða talið av fiskakassum av hesum slagi helst verður millum 150.000 og 200.000, um tað skal verða nóg mikið til donsku fiskimenninar.

Tað er heimasíðan hjá Dansk Fiskeritidende, sum ber hesi tíðindi.

# Avmarkað toskaveiða

NÝ FOUNDLAND
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað hevur ikki verið loyvt at fiska tosk við Ný Foundland síðan 1992, tá toskurin har yviri hvarv. Nú er kortini loyvt aftur í ávísum tíðarskeiði at fiska tosk til húsbrúks. Talið av toski í loyvdu veiðini er 15 fyri hvønn luttakara.

Tá loyvt var at veiða tosk aftur fyrr í summar, loystu fleiri hundrað bátar í Ný Foundlandi og løgdu út á hav.

Men tað eru ikki øll, sum eru eins fegin um, at avmarkað toskaveiða til húsbrúks er loyvd.

Framvegis er lítil toskur við Ný Foundland, og umhvørvisfólk halda tað ikki vera rætt at loyva veiði eftir toski til húsbrúks heldur.

Vinnulig toskaveiða við Ný Foundland varð steðgað í 1992, og enn er toskurin ikki komin aftur á sínar traditionellu leiðir.



Í ár hevur verið loyvt at veiða í mesta lagi 15 toskar í part fram til 27. september.